## Sigla sum ongantíð áður

**Vøksturin á ferðafólkatalinum við strandafaraskipunum er ovurhonds stórur hesa vikuna**

STRANDFERÐSLAN
*Jákup Mørk*

Tað kemur eftir øllum at døma væl við hjá fólki, at tað hesa vikuna er ókeypis at sigla við skipunum hjá Strandferðsluni.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at eitt nú hevur ferðafólkatalið mána-, týs- og mikudagin verið 2.800 mótvegis 1.400 sama tíðarskeið í fjør. Á Teistanum er talið 2.000 mótvegis 1.350 somu dagar í fjør.

Enn er ikki greitt við neyvum tølum, hvussu stórur vøksturin í bilaflutninginum hevur verið.



*Seinastu tríggjar dagarnar hevur Teistin flutt 2.000 ferðafólk*

# Sundiver á G!

**Rokkur úr Sveis verður á Skránni á ársins G! Festivali, tá Sundiver enn einaferð leita sær til Føroyar at spæla sín sjálvstøðuga rokk**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Sveisisku Sundiver koma til Føroyar at spæla rokk*

Sveisiski bólkurin Sundiver, ið vitjaði Føroyar í oktober í fjør verður eitt av nøvnum á G!. Bólkurin spældi tá 3 væleydnaðar konsertir í Losjuni við Gøtugjógv, REX og í Kambsdali.

Sundiver hevði tá júst givið sína fyrstu fløgu út á føroyska útgávufelagnum TUTL, og ferðin til Føroyar var í sambandi við útgávuna.

### Hitta í Sveis

Stakfløgan "Jonas" av fløguni hevur klára seg væl í Sveis, og hevur ligið á hitlistanum hjá Radio 3Fach. Tónleikurin er sjálvstøðugur rokkur, siga teir, og leggja dent á, at teir fevna nokkso breitt, frá friðaligum rokki til harðan rokk. Bólkurin varð stovnaður í 2002, og limirnir hava síðan tá spælt nógvar konsertir kring Sveits, m.a. saman við Høgna Lisberg og Makrel.

Talan er um royndar tónleikarar, ið allir hava verið virknir á tónleikapallinum í 10 ár, og í hesum bólkinum samansjóa teir allar royndirnar til sín heilt egna stíl og tónleik. Remo, ið spælir slagverk í Sundiver, sigur, at bólkurin spælir eitt sindur flótandi rokktónleik, við eitt sindur av íblástri frá The Cure, men tó nógv meira rokkkent.

Limirnir í bólkinum siga, at teirra ferð til Føroyar gjørdi teir munandi kendari í Sveis, og úrslitið vóru fleiri og størri konsertir fyri bólkin.

### Føroyar/Sveis sambandið

Tilknýtið hjá Sundiver til Føroyar er komið í lag í gjøgnum samstarvið Faroe-Switzerland connection, ið er samstarv millum útgávufelagið TUTL og nakrar eldsálir í Sveis, sum Kristian Blak kallar tey. Kristian sigur, Felix vandenBerg, ið er primus motor fyri samstarvinum, hevur gjørt eitt megnar arbeiði við at fáa føroyskan tónleik fram í Sveits. Higartil hava Høgni Lisberg, Makrel og Yggdrasil spælt í Sveits, og serliga Høgni Lisberg er vorðin eitt kent navn í ávísum pørtum av Sveits.

Yggdrasil hevur í tveimum førum og í tveimum útgávum vitja Sveits, einaferð við Kára Sverrisyni sum sangara og einaferð við Eivør Pálsdóttir, hesar ferðir eydnaðust sera væl.

## Almennur fyrilestur á Setrinum

**Almennur fyrilestur um Dátugrevstur í lívfrøðidátum verður hósdagin 4. mai kl. 15 í Ovastovu í Nóatúni**

FYRILESTUR
*tíðindaskriv*

Tað er Paul Fischer, lektari á Danmarks Tekniske Universiteti, sum fer at greiða frá hvussu dátugrevstur kann brúkast til at kanna munir og skyldskap millum ymisk sløg av soppum. Viðgerðin byggir á serligar spektrumsmátingar.

Í fyrilestrinum verður víst á ein hóskandi dátubygnað og algoritmur til at gera slíkar kanningar. Eisini verður víst á, at tílíkar metodur kunnu brúkast til onnur sløg av dátum.

Dátugrevstur, ið er ein vísindagrein í støðugari menning, fevnir um ástøði, háttaløg og amboð við tí í hyggju at lýsa møgulig mynstur, broytingar, sambond og frávik í stórum dátumongdum.

Atgongumerkini í handlunum

# Rebecca St. James í Føroyum

Frá mánadegnum vera atgongumerkjir til konsertina við Rebecca St. James at fáa á Shell-støðunum kring landið og í Vár.

Rebecca St. James fer at hava konsert í Kelduni í Skálafirði 31. mai klokkan 20.00. Týska sangarinnan Sarah Brendel fer at hita pallin, og Sarah fer fylgjandi dagarnar at hava ókeypis konsertir í Christianskirkjuni, Berøa, har SALT luttekur saman við Sarah, og í Havnar kirkju.

Eftir at nýggjasta fløgan við Rebecca St. James hevur verið útseld, fæst hon nú aftur frá fyrireikarunum, sum eisini hava tilboð við fløgum og atgongumerkjum á heimasíðuni www. gjamma.fo HYPERLINK „http://www.gjamma.fo/" http://www.gjamma.fo/

Fløgurnar fáast eisini til keyps har atgongumerkini vera seld.

Rebecca St. James er júst nú á heimsrundferð og er júst komin heim til USA eftir fleiri stórar konsertir í Australia. Tá hon kemur til Føroya í mai hevur hon við sær eitt fylgi við 18 fólkum - tónleikarar, sangarar og teknikkarar - sum skulu syrgja fyri, at føroyingar fáa eitt upplivilsi fyri lívið.



## Jamm, Sámal og Ronnie og barrflugur í Glitnir

Hóskvøldið verður Jamm kvøld í Glitnri, hústrubadururin Andreas Arge leggur fyri og hitar eitt sindur upp, síðan er einhvørjum frítt at royna síni "jammevnið". Fríggjakvøldið fer Føroya besti tvímansbólkur Sámal og Ronnie á pallin.

Leygarkvøldið spælir Jógvan´sa barrflugubband, tað er Jógvan Nolsøe, sum er oddamaður í bólkinum, afturat sær hevur hann Áka Hermanssen og Jón McBirnie.

**nud**

# Eyðun og Neil í Manhattan

Neil Joensen og Eyðun Ásason spæla hóskvøldið, fríggjakvøldið og leygarkvøldið í Manhattan. Teir báðir hava seinastu tíðina spælt nógv saman, og eru ein av festligastu tveymannsbólkunum í landinum. Eyðun byrjaði sína yrkisleið sum ein av best umtóktu barrsangarum í Føroyum í Manhattan, so hetta vikuskiftið kemur hann heim.

Eyðun hevur fortíð í MC-Hár, har hann eitt tíðarskeið var sangari. Hann er føddur inn í eina familju av góðum sangarum, systirin er eingin minnið enn navnframa Guðrun Sólja Jakobsen. Við sær hevur Eyðun, Neil sum tey flestu munnu minnast, sum gittarleikara hjá Guðrun á AME.

**nud**